Glenn Hurren, kunningarstjóri hjá Wood Group:

– Sjálvandi skal virksemið vera út frá føroyskari jørð

Glenn Hurren her í Norðurlandahúsinum framman fyri stóra kortið hjá Amerada Hess bólkinum
Mynd jan

JAN MÜLLER

Millum mongu luttakararnar á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í farnu viku var eisini Glenn Hurren, sum starvast sum kunningarstjóri hjá stóru skotsku fyritøkuni Wood Group. Hon er partur av heimsumfatandi fyritøkuni John Wood Group Plc., sum hevur skrivstovur um alla verðina.

-Eg haldi, at henda ráðstevnan hevur verið framúr. Tit eiga at vera ernir av henni. Hvussu tit hava borið tykkum at fáa so nógvar av oddamonnunum í fleiri av teimum stóru oljufeløgunum til land tykkara longu nú, langt áðrenn boring er byrjað, er mær ein gáta. Men tað hevur eydnast tykkum, og tað haldi eg er væl klárað, sigur Glenn Hurren, sum er hugtikin av fólkunum - fyri teirra dygd og professionalismu - sum hava sitið báðumegin borðið á ráðstevnuni, tvs. bæði útlendingunum og so føroyingunum, sum hava hildið fyrilestrar. Talan hevur verið um eitt professionelt støði, og heldur hann hesa ráðstevnuna verða eitt greitt tekin til føroyingar um, at oljufeløg og kontraktorfeløg hava alstóran áhuga fyri føroyska landgrunninum.

Hann vísir á, at tað hevur verið sera áhugavert at lurta og er hann eisini ovfarin av tí stóru luttøkuni frá føroyskari síðu. Hon vísir, at føroyingar vilja vita meira og vilja læra nakað um hesa nýggju vinnu, sigur hann.

-Vit í Wood Group taka okkum serstakliga av logistikki, tvs. flutningi og tænastum í sambandi við eitt nú boring eftir olju og gassi.

Teir hava útgerðarstøðir í fleiri av teimum stóru havnunum í Bretlandi og Skotlandi. Tvær av teimum mest týðandi eru tær í Aberdeen og Great Yarmouth. Í fjør tóku teir ímóti ikki minni enn 2000 útgerðarskipum í hesum báðum havnunum.

Góðir møguleikar

-Eg eri komin til Føroya fyri at hyggja eftir møguleikum at vera við til at byggja upp líknandi umstøður her, nú tá oljuvinnan stendur fyri framman. Hann sipar her til útgerðarhavnir, sum skulu kunna veita tænastur til komandi leitingarvirksemið í føroyskum øki. Tað ræður um nú at finna hóskandi pláss og fyrireika seg uttan to longu nú at gera tær stóru íløgurnar.

Bæði oljufeløgini og kontraktorfeløgini, sum verða við í leitingarvirkseminum, fara at hava brúk fyri útgerðarhavnum í Føroyum, skulu tey ikki brúka verandi støðir í Skotlandi t.d.

-Okkara uppgáva er saman við tykkum at finna slík pláss í Føroyum og finna partnarar her, vit kunnu arbeiða saman við. Vit eru hugaðir fyri at gera samstarvssáttmálar við fólk á staðnum og láta tykkum fáa lut í okkara royndum. Verður veruligt oljuvirksemi seinni, so eru vit eisini sinnaðir at gera íløgur her, tá sigur Glenn Hurren, sum heldur, at er tað eitt ynski frá føroyskari síðu, at oljuvinnan skal brúka føroyskar vørur og tænastur so sum eina útgerðarhavn, so eiga føroyingar eisini at gera vart við hetta. Tað kann m.a. gerast í tí løggávu og teimum treytum, sum verða settar feløgunum fyri at kunna virka á føroyskum øki í eini leitingarfasu og eisini tá framleiðsla fer í gongd.

Tað kann vera, at tað fyri summi feløg kanska vildi verið lættari og bíligari at brúkt verandi støðir í Skotlandi, men var eg føroyingur, so hevði eg eisini viljað havt slíkt virksemi í Føroyum, tí tað kann fáa stóran týdning fyri eitt so lítið samfelag sum tað føroyska.

Við hesum sipar Glenn Hurren eisini til fyrilesturin, sum íbúgvi frá Orknoyggjunum helt á oljuráðstevnuni, har hann gjørdi greitt, at tað var ein missur fyri Orknoyggjar, at eingin útgerðarstøð var komin har um sama mundið, sum hetlendingar løgdu seg eftir at fáa eina slíka. Føroyingar eiga sum so at fylgja tí hetlendska modellinum, tí ein útgerðarhavn fer at hava so nógv annað virksemi við sær.

Hvat heldur hann so um eitt krav, sum sigur, at allar vørur, sum skulu brúkast umborð á boripallunum á føroyskum øki, skulu yvir føroyska keikant?

Eg vildi sagt, at tað er væl skiljandi. Tað eigur ein so at gera greitt í lógini, so ein og hvør skilur tað. Men hetta er so nakað, sum føroyingar mugu taka støðu til.

Viðgerð av donskum vísum

So góða undirtøku fekk fyrsta bókin í kvæðarøðini »Søga og stev«, tá ið hon kom út nakað fyri jól 1996, at onnur bókin kemur út longu nú.

Í »Søgu og stev 2«, sum Árni Dahl hevur skrivað, og sum forlagið FANNIR gevur út, verða tíggju danskar fólkavísur viðgjørdar, tær ið vanliga hava verið at hoyrt á gólvi í Føroyum og sum hava søgugrund aftur í 13. øld - flestu teirra: »Burnamand holder i fjeldet ud«, »Det var Bøhmerlands dronningen«, »Dronning Dagmar ligger i Ribe syg«, »Kong Sverke«, »Det er nu sket udi vor tid«, »Der ere så mange i Dannemark, som alle ville herrer være«, »De røvere tolv«, »Ribolt«, »Svend vonved«, »Kong Hans« - Umframt er eisini vísan um »Norsku Løvu« tikin við og føroyska týðingin av donsku brúðarvísuni.

Bókin er 175 síður til longdar, og aftan er orðalisti. Kápumyndin er partur av kálkmálninginum »Dansur um 1350«, sum er úr Ørslev kirkju á Sælandi. »Søga og stev 2« kostar kr 150,-

Ja! Send mær oljupakkan, sum eg gjaldi 1000 krónur fyri

☐ Við. kekki ☐ Postuppkrav ☐ Banka/giroflyting

Navn: ....

Bústaður ....

....

Postnr. bygd/býur ....

....

Tel.: ....

Undirskrift: ....

Send lepan til:
Tíðindablaðið Sosialurin,
Box 76, 110 Tórshavn

Mennandi kjak krevur kunnleika;

Í Oljupakkanum fært tú alt tilfarið, sum hevur staðið í Tíðindablaðnum Sosialinum seinastu 25 árini um oljuvinnu og marknasamráðingar. Tilsamans fleiri enn 1200 síður í trimum ringbindum. Oljupakkin er á tremur við upplýsandi greinum, áhugaverdum samrøðum, viðmerkingum og øðrum. Skalt tú fylgja við í dag, mást tú eisini hava bakgrundina við – og hana fært tú frá Sosialinum fyri 1000 krónur!

Bílegg tær oljupakkan nú – 1200 síður fyri 1000 kr.